# LYKLAKLÁR RAÐHÚS Í STREYMNESI TIL SØLU !



VESTURSÍÐAN VIÐ ÚTSÝNI YVIR HVALVÍK

STOVUHÆDD LOFTIÐ



RAÐHÚSINI LIGGJA Í HVALVÍKAR KOMMUNU – EIN KOMMUNA Í MENNING

- Stovuhæddin er 90 m²
- Loftið er 70 m²
- Nýggj útstykking.
- Vakurt barnavinarligt umhvørvi.
- Tryggja barnaansing í nýggjum stovni – 1000 m
- Barnaskúlin í Hvalvík – 1000 m
- 30 minuttir til Havnar
- 30 minuttir á Flogvøllin
- 30minuttir til Klaksvíkar (Tá undirsjóvartunnilin er liðugur)
- 30 minuttir til Gjáar
- 20 minuttir til Runavíkar

PRÍSIR ÚR 950.000,- Kr.

RINGIÐ OG FÁIÐ NÆRRI AT VITA !

Sp/f TN-BYGGING
Heimistovuvegur 4 • FO-625 Glyvrar • Tel 44 95 10 ella 21 13 10
E-mail: torben@post.olivant.fo



# Hús í Runavík til sølu



Um hóskandi boð fæst, eru omanfyri nevndu hús í Runavík til sølu. Husini eru í trimum hæddum, harav kjallarahæddin og miðhæddin eru 130 m2 hvør, meðan loftshæddin er 80 m². Grundøkið er stórt 701 m², harav umleið 300 m² er urtagarður.

Húsini eru bygd í 1970. Tey eru gjørt úr betongi, klødd við plastvinyl og hava træskjøldur. Húsini eru isoleraði og hava jarntak.

Í kjallarahæddini er bilhús, vaskikjallari, gongd, hobbyrúm og kjallararúm. Í miðhæddini er inngongd, hjallur, 4 sovikømur, køkur, stova, gongd og wc v/bað. Á loftshæddini er gongd, 2 sovikømur, sjónvarpsstova, klædnarúm og wc v/brúsu.

Áhugaði kunnu venda sær til:

**Advokatfelagið við Strond 4**

**Advokatfelagið**
Yviri við Strond 4 · Boks 359
FO-110 Tórshavn
Tlf. 311260 · Fax 311261
Telefontíð: 9³⁰-12⁰⁰ og 13⁰⁰-16⁰⁰

Tórmóður Djurhuus, adv. Ingi Højgaard, adv.
Jógvan Páll Lassen, adv. Petur Even Djurhuus, adv.
Jógvan E. Ellefsen, adv. Anna Dam, adv.



TÓRSHAVNAR KOMMUNA



# Ólavsøkan 2003

Viðvíkjandi sølu og tiltøkum

Freistin at flýggja inn umsóknarblaðið er sett til fríggjadagin 20. juni 2003 kl. 12.00.

Umsóknir, sum verða latnar inn eftir 20. juni 2003 kl. 12.00, verða ikki viðgjørdar.

Øll søla og tiltøk, sum skulu vera á ólavsøku ella lýsast í ólavsøkuskránni í ár, skulu nýta serligt umsóknarblað, ið fæst í Snarskivuni.

www.torshavn.fo



**Asfalteringsarbeiði til privat og vinnuligt**

Alt asfalteringsarbeiði, so sum: Vegir, gongubreytir, parkeringsøki, tún og annað verður gjørt.

Tel 220179 Jóhannus Rasmussen
Tel 227910 Heri Jacobsen

Asfalt Sp/f
H.J. Asfalt

Sp/f H.J Asfalt • Fo-660 Søldarfjørður

Sosialurin 341800


<ph_1>

www.sosialurin.fo
www.sosialurin.fo




# Edv-starvsfólk

Søkt verður eftir einum starvsfólki til edv-deildina hjá politinum at arbeiða fulla tíð (38 tíma viku) frá 1. juli 2003 at rokna ella skjótast tilber eftir henda dato.

Vanliga arbeiðsstaðið er politistøðin í Havn, men roknast kann við uppgávum á hinum tænastustøðunum eftir tørvi. Umfram Havnina eru politistøðina í Klaksvík, Runavík, Vestmanna, Miðvági, Sandi og á Tvøroyri – ella 11 ymisk støð við samanlagt gott 100 starvsfólkum.

**Førleikakrav:** Tú skalt vera við til at umsita edv-útgerðina, fremja brúkaraadministratión, system-administratión, umsita e-post, røkja Meridian-telefonskipan v.m. Forritini Windows 98, -2000, -NT, MS Office og Exchange verða brúkt. Nakað av førleika til UNIX minidatamat er ein fyrimunur, men ikki nakað krav.

Tú skalt bæði kunna arbeiða saman við øðrum og sjálvstøðugt.

Hevur tú áhuga í hesum arbeiði, góð samstarvsevni, neyðuga útbúgving og/ella verkligan førleika væntar vit at hoyra frá tær.

Øll eru vælkomin at søkja, uttan mun til kyn, átrúna ella etniska støðu.

Lønar- og setanarviðurskifti samsvarandi avtalu millum danska fíggjarmálaráðið og viðkomandi fakfelag.

Hevur tú spurningar, ert tú vælkomin at ringja til Sóley í Selvindi, tlf. 35 14 48 lok 5555.

Skrivlig umsókn við avriti av prógvum, viðmælum – og har tú setur fram tíni lønarkrøv – verður at senda til: Føroya Landfúti, Postboks 3018, FO-110 Tórshavn, innan 24. juni 2003.

**Føroya Landfúti**



**Fíggjarmálaráðið**

# Varastjóri

Toll- og Skattstova Føroya er stovnur undir Fíggjarmálaráðnum.

Uppgávur stovnsins eru m.a. at fyrisita
- skattalógina
- tolllógina
- mvg-lógina
- kolvetnisskattalógina
- avgjaldslógirnar, eins og alla skuldar-innkrevjing hjá landinum

Stovnurin hevur 150 starvsfólk og er skipaður soleiðis, at planlegging og menning fer fram í Stýrinum á Argjum. Tær seks økisskrivstovurnar, ið eru á Tvøroyri, í Skopun, Sørvági, Tórshavn, Saltangará og Klaksvík røkja raksturin.

Í Stýrinum, har viðkomandi kemur at starvast, eru 30 starvsfólk.

Lýsingin finst eisini á heimasíðunum:
www.fmr.fo
www.tollskatt.fo

E-mail:
fmr@fmr.fo

Kundi tú hugsað tær at verið varastjóri í Stýrinum fyri Toll- og Skattstovu Føroya?

Tú kemur í tøttum samstarvi við stjóran at taka tær av leiðsluni á Toll- og Skattstovu Føroya, ið m.a. fevnir um hesar uppgávur:

- Seta mál og langtíðarplanlegging
- Fíggjarstýring
- KT-politikkur og KT-viðurskifti
- Trygdarpolitikkur og trygdarviðurskifti
- Innanhýsissamskifti øki og deildir
- Samskifti við borgarar og virki
- Uttanlandssamskifti
- Veita landsstýrismanninum í Fíggjarmálum tænastu
- Skatta- og avgjaldsfyrisitingarpolitikkur
- Eftirlitspolitikkur
- Innheintingarpolitikkur

Hevur tú visiónir, góð samstarvsevni, og ert tú ágrýtin, virkin og úrslitagóður, ert tú vælkomin at senda okkum eina umsókn. Leiðsluútbúgving og leiðsluroyndir kunnu vera ein fyrimunur.

**Krøv**
Útbúgving frá hægri lærustovni krevst, t.d. innan fak sum fíggjarstýring, kunningartøkni, fyriskipan o.a.

**Setanarviðurskifti**
Starvið verður sett eftir sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi fakfelag og verður sett 1. september 2003. Starvið verður flokkað ájavnt við **37. lønarflokk** í tænastumannafelagssáttmálanum.

**Umsóknarfreist**
Kundi tú hugsaða tær at roynt hesa avbjóðing, so send okkum eina umsókn, CV og viðmæli, innan mánadagin 30. juni 2003.

**Fíggjarmálaráðið**
Postboks 2039
165 Argir

Vilt tú frætta meir, ert tú vælkomin at ringja til Petur Alberg Lamhauge, aðalstjóra, á tlf. 352020.



# TILBOÐ

Brandt (Blomberg) **Vaskimaskinur**



WFF1312
- 5,0 kg
- 1300 snúningar
- Orkuflokkur A

Kr. 4.676,-



WFH1670
- 5,5 kg
- 1600 snúningar
- Orkuflokkur A

Kr. 7.196,-

pf Klement Petersen
Høgaból • 600 Saltangará • tel. 447560 • fax 448460

Sosialurin 341800



# Campingvognar!!!



Vit hava fingið einaumboð uppá HOBBY campingvognarnar. HOBBY eru mest seldu campingvognar í Europa – eisini í Danmark.

Í sambandi við stevnuna sýna vit fram, á Strondum, tann nýggjasta HOBBY-460.

Vit hava opið leygardagin frá kl. 10 til 17. Sunnudagin eftir kappsiglingina.

*Hjartaliga vælkomin.*

**P/F HANSEN**
447142 - 218540



Keypssamtøkan í Hoyvík

# Skrivstovustarv

Søkt verður eftir fólki til skrivstovuna í Keypssamtøkuni í Hoyvík, at byrja 1. juli 2003, ella skjótast tilber.

Tað er ein fyrimunur, men eingin treyt, um viðkomandi hevur royndir innan fyri skrivstovuøkið.

Talan er um fulltíðarstarv. Løn sambært S & K.

Meira fæst at vita um starvið hjá Finn Nielsen, tlf. 210214.

Umsókn skal innan 21. juni sendast til

**FK Hoyvík**
**Box 349**
**188 Hoyvík**